## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og landsynningi, sum út á kvøldið minkar niður í lot til andøvsgul. Skýggjað, men okkurt ælið. Hitin um 5 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av suðri. Skýggjað við ælaveðri av og á. Hitin millum 6 og 8 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Upp til gul av ymsum ættum. Skýggjað, men okkurt ælið. Hitin millum 6 og 8 stig.

**Mánadagin og týsdagin:**
Gul til andøvsgul av suðri og landsynningi. Skýggjað og regn eitt skifti, seinni slítur í. Seinni støkkur hann vesturum til vestan ella útnyrðing og veksur upp í stívt andøvsgul. Týsdagin andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi. Hitin millum 7 og 10 stig.

# Undulátur vitjar Argja skúla



**Ein vilstur undulátur situr nú í búri í stovuni hjá 4. a í Argja skúla. Eigarin fær fuglin aftur við at venda sær til skúlan**

VILSTUR UNDULÁTUR
*Eirikur Lindenskov*

4.a í Argja skúla fekk forkunnuga vitja í gjár. Best sum næmingarnir sita og stríðast í lærugreinini Náttúra og Tøkni, varnast onkur, at ein einsamallur undulátur situr á eini grein í runnunum uttan fyri gamla skúla.

Næmingarnir royna við glúpi at fanga undulátin, men hann vil ikki fangast. Tey royna síðani at fáa hann at seta seg á fingurin, so sum tamir fuglar plaga at gera, men tað hjálpir heldur ikki. At enda eydnast tað teimum kortini at fanga fuglin.

Tað vóru næmingar úr báðum fjórðu flokkunum sum fangaðu fuglin, sum nú situr í búri í floksstovuni hjá 4. a á Argjum.

Tey á Argja skúla vita ikki, hvør fuglin eigur, hóast tey vita um onkran á Argjum, sum eigur sjey undulátar.

Men eigarin fær fuglin aftur við at venda sær til Argja skúla, heilsa tey í 4.a.



*Tað vóru næmingar úr 4. a og 4. b í Argja skúla, sum fangaðu undulátin. Eigarin fær hann aftur við at venda sær til skúlan*

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷2 |
| Nuuk | ÷2 |
| Qaqortoq | ÷2 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | ÷1 |
| Halifax | 0 |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 2 |
| Tromsø | 3 |
| Bergen | ÷1 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | ÷2 |
| Keypmannah. | 0 |
| Helsinki | – |
| Moskva | – |
| Berlin | ÷5 |
| Warzawa | ÷4 |
| Kiev | – |
| Bukarest | – |
| Paris | 2 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 16 |
| Athen | – |
| Malta | 16 |
| Tunis | 17 |
| Beijing | 3 |
| New Dehli | 20 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 25 |
| Sydney | – |
| New York | 3 |
| Miami | – |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 25 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt hátrýst yvir Suður-Noreg liggur í stað inntil leygardagin og fer síðani spakuliga í eystureftir inn yvir Russland.



Eitt lágtrýst við Suður-grønland fer norðureftir fram við eysturstrond Grønlands og mánadagin í ein landnyrðing norður um Noreg. Brúgvaløg haðani verða yvir Føroyum mánadagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 11/12 kl. 06⁰⁰– 12/12 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,5°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 1,5 mm – mált frá 11/12 kl. 06⁰⁰– 12/12 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í desember: 41,0 mm


HESTPRENT Spf.
...hvør sigur at vit eru sum onnur?
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo






BLÓÐBANKIN
Telefon 311397


## VESTFALLSKYRRINDI

11. des.: Fyrra kvarter
14. des.: Mánin longst frá jørðini
19. des.: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 13. des. | 02.07 | 14.25 | 01.07 | 13.25 | 01.22 | 13.40 | 04.07 | 16.25 | 05.07 | 17.25 | 00.22 | 12.40 | 11.40 | 23.59 | 02.22 | 14.40 | 03.22 | 15.40 | 01.52 | 14.10 | 03.07 | 15.25 |
| 14. des. | 02.44 | 15.02 | 01.44 | 14.02 | 01.59 | 14.17 | 04.44 | 17.02 | 05.44 | 18.02 | 00.59 | 13.17 | — | 12.17 | 02.59 | 15.17 | 03.59 | 16.17 | 02.29 | 14.47 | 03.44 | 16.02 |
| 15. des. | 03.21 | 15.39 | 02.21 | 14.39 | 02.36 | 14.54 | 05.21 | 17.39 | 06.21 | 18.39 | 01.36 | 13.54 | 00.36 | 12.54 | 03.36 | 15.54 | 04.36 | 16.54 | 03.06 | 15.24 | 04.21 | 16.39 |
| 16. des. | 03.58 | 16.19 | 02.58 | 15.19 | 03.13 | 15.34 | 05.58 | 18.19 | 06.58 | 19.19 | 02.13 | 14.34 | 01.13 | 13.34 | 04.13 | 16.34 | 05.13 | 17.34 | 03.43 | 16.04 | 04.58 | 17.19 |

5 707265 100050 >